# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Javnaðarflokkurin gleið aftur til 1932

Sambandsflokkurin hevði størstu afturgongdina, Javnaðarflokkurin var einasti flokkur, sum misti í tingmannatali, teir smáu vunnu hvør sín sess afturat, og Tjóðveldisflokkurin gjørdist Havnarflokkur. Útjaðarin misti tingfólk, og høvuðsstaðurin fekk størri umboðan.

Soleiðis kunnu vit í stuttum samanfata úrslitið av løgtingsvalinum leygardagin. Samgongutelvingin fer nú fram – og til nærri frættist um hetta, kunnu vit bert hugleiða um, hvørjir møguleikar vísa seg.

Eingin ivi man vera um, at tað svíðir mest hjá Javnaðarflokkinum. Flokkurin hjá løgmanni fekk tað vánaligasta valið í 76 ár. Valið í 1932 var eisini 19. januar, og tá fekk Javnaðarflokkurin 10,5%. Um vit síggja burtur frá katastrofuvaliunum fyri Javnaðarflokkin í 1994, so er valið leygardagin floksins vánaligasta val. Tað sum eisini er vert at merkja sær er, at flokkurin hevði stóra afturgongd í gamla Suðuroyar valdømi. Høvdu vit gomlu skipanina, so fekk flokkurin bara eitt umboð valt í Suðuroy, og tað er bara tvær ferðir hent áður, í 1928 og í 1932. Síðani hevur flokkurin havt skiftivís tveir og tríggjar mans valdar í Suðuroy. Heldur Jóannes Eidesgard fram sum løgmaður, so er einki javnaðartingfólk umboðandi Suðuroynna, og tað er ongantíð hent áður.

Hvørja ávirkan tað hevur havt, at Føroyar nú eru eitt valdømi, kann sjálvandi vera ilt at meta um. Men flokkarnir hava ikki dugað nóg væl at stilla upp, og tað er sera undrunarvert, at eingin flokkur megnaði at fylla listan upp við teimum 43 loyvdu valevnunum. Javnaðarflokkurin hevði 13 tóm pláss á listanum. Vóru 13 fólk afturat á listanum – og høvdu tey fingið tvær nýggjar atkvøður í part, so hevði Javnaðarflokkurin fingið sjey tingsessir.

Tað er eingin ivi um, at floksorganisatiónirnar ikki virka nóg væl. Størsta orsøkin til, at flokkarnir ikki megna at fylla listan, er uttan iva at finna í organisatiónunum hjá flokkunum. Tann einfaldi spurningurin er, hví hava flokkarnir ikki altíð ein lista kláran? Hvussu ber tað til, at tað skal koma sum eitt yvirraskilsi, hvørjar ferð tað verður val?

Løgtingið fíggjar politisku flokkarnir gjøgnum fíggjarlógina við stuðulinum til politiska upplýsing. Tá tingmenn vilja vera populistiskir, so skerja teir hesa játtan. Men teir eiga nú at viðganga, at veljarnir setir flokkunum krøv, og fyri at flokkarnir skulu virka, krevst sjálvandi, at fíggjarliga grundarlagið er í ordan. Tað er ikki, sum nú er, og tað eiga politikararnir at gera nakað við – tí tað er grundarlagið fyri, at vit varðveita eina rímuliga javnvág av tingfólki kring landið.

**Sosialurin**

# Sjálvstýrisrák

**Sjálvt um fullveldismálið ikki vigaði tungt í valstríðnum, so kann staðfestast, at veljararnir hava meira ella minni sett tað aftur á dagsskránna við at velja andstøðuna og styrkja fullveldisvongin í Fólkaflokkinum**

**SÍÐULINAN**
*Jan Müller,*
*Ábyrgdarblaðstjóri*
*jan@sosialurin.fo*



Hóast samgongan varðveitti sín meiriluta, so var andstøðan, serstakliga smærru flokkarnir, vinnarin, nú teir øktu sítt tingmannatal. Tjóðveldi fekk tó eisini eitt sera gott val. Hetta merkir so aftur, at valúrslitið gjørdist ein sigur fyri sjálvstýriskreftirnar í føroyskum politikki. Eisini innanhýsis í bæði Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum eru sjálvstýrisvengurnir styrktir. Møguliga eisini í Sambandsflokkinum, um man so kann siga, við nýggja tingmanninum og stemmuslúkaranum Magna Laksáfoss.

Valstríðið avdúkaði, at lítil munur er á teimum trimum andstøðuflokkunum, soleiðis at skilja, at meðan Tjóðveldi framvegis er fyri fullveldi, so eru hinir báðir munandi radikaliseraðir. Hetta er serstakliga galdandi fyri Sjálvstýrisflokkin, sum í spurninginum um sjálvstýri mestsum lá á somu kós sum Tjóðveldi. Fólkaflokkurin var tann av samgonguflokkunum, sum stóð seg frægast, samstundis sum sokallaði sambandsvongurin í hesum flokki mestsum hvarv. Tað ber tí til at tulka valúrslitið sum eitt økt krav frá veljarum floksins um eina meira radikala sjálvstýriskós. Hetta kann eisini tulkast sum, at tær yvirtøkur, sum vórðu framdar av samgonguni, ikki eru nøktandi fyri ein stóran part av veljarafjøldini, ið meira ella minni hellir til fullveldi. Eingin ivi var um hetta hjá nývaldu tingkvinnu floksins, tá hon var í útvarpinum eftir valið fokuseraði uppá fullveldi. Tá hetta er sagt, so hava ivaleyst eisini onnur evni enn sjálvstýrismálið ávirkað støðu fólkafloksveljarans.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin eru viknaðir, og hetta fer ivaleyst at ávirka samgongusamráðingarnar uttan mun til, um hesar enda við framhaldandi ABC samgongu ella eini heilt aðrari samanseting. Fyri Javnaðarflokkin má valúrslitið vera eitt stórt vónbrot. Víst kann flokkurin ugga seg við, at tað slítur at hava leiðsluábyrgd, men hetta er ikki nóg mikið. Her mugu vera aðrar orsøkir, og hetta veit flokksleiðslan. Tað er tí ikki óhugsandi, at tað verður eitt ella annað eftirspæl í Javnaðarflokkinum. Í øllum førum má leiðslan finna út av, hvat tað var, sum gekk galið og fremja eina erliga og grótharða eftirmeting, sum kann gerast ótespilig fyri leiðsluna. Uttan at fara inn í nakrar djúpari útgreiningar kunnu vit sláa fast, at flokkurin ikki hevur verið nóg sjónligur í samgonguni og kom ov seint á vøllin við sínum hjartamálum, sum so lutvíst duttu á gólvið, tá val varð útskrivað. Boðskapurin kom als ikki nóg væl fram í valstríðnum, og flokkurin tykist ikki at hava fingið eins góða professionella ráðgeving sum aðrir flokkar. Tá hugsað verður um, hvussu væl Javnaðarflokkurin er fyri fíggjarliga, so kann ein ikki annað enn undrast yvir, at flokkurin ikki nýtti fleiri møguleikar at koma út við boðskapinum. Flokkurin misti annars vælumtókta tingmannin í Gøtu, helst tí hesin als ikki var sjónligur í valstríðnum og flokkurin hevur megnað at marknaðarføra seg sum formann í eini so týðandi tingnevnd sum Mentanarnevndini. Eisini her hevur floksapparatið svikið. Og síðani hevur flokkurin ikki gjørt nokk at fylla út holini eftir, at Hendrik og Sverri ikki stillaðu uppaftur. Flokkurin stillaði bara 30 valevni upp, meðan Tjóðveldi stillaði upp 38. Hevði Javnaðarflokkurin gjørt sær størri ómak og politika floksapparatið fungeraði betur, og eitt nú fleiri valevni vóru á listanum, tá hevði hann uttan iva fingið tær 25 atkvøðurnar, sum restaðu í at fáa sjeynda tingfólkið.

Stóri spurningurin, hvør samgongan verður, er ikki svaraður, og svarið er als ikki givið. Fólkaflokkurin hevur í og við, at fullveldisvongurin styrktist, fingið eitt klárt signal frá sínum veljarum, so her verður sjálvrannsakan við lít. Leiðslan í Tjóðveldi veit, at flokkurin tolir illa at vera uttan ávirkan enn eitt valskeið – átta ár í politiskari oyðimørk er dapurt útlit hjá hesum flokki. Hann vil tí fara sera langt fyri at hála Fólkaflokkin burtur frá sambandsflokkunum og kann eitt nú fara at bjóða erkafíggindanum Jørgen Niclassen løgmannsessin, sum hesin illa kann kasta aftur, hóast sárini ivaleyst enn bløða.

Smáu flokkarnir vilja gera alt fyri at koma í samgongu, so her eru nógvir møguleikar opnir. Eitt nú EDB. Heldur ABC hinvegin fram, ber ikki til at halda fram sum higartil. Javnaðarveljarar fara uttan iva at krevja av floksleiðsluni, at hon tekur annað skinn um bak og ger flokkin meira sjónligan við sínum kjarnumálum. Sambandsflokkurin fer uttan iva at seta strong krøv til bæði A og C fyri at halda fram, eitt nú fleiri tung landsstýrisøki og at EU-málið kemur á dagsskránna. Og Fólkaflokkurin fer at raðfesta sjálvstýrisspurningin hægri.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.